# Cecil aftur fremst

**Cecil Weihe vann Tórshavn Marathon, hóast hann dagin fyri hevði runnið hálvt marathon á Oyggjaleikunum í Hetlandi**

RENNING
*Heri Ziska*

Tórshavn Marathon varð runnið fyri triðju ferð um vikuskiftið, og hetta er ein kapping, sum er komin fyri at verða. Í ár vóru tað 169 fólk (104 mans og 65 kvinnur), sum runnu teir fýra ymisku teinarnar, sum eru partur av Tórshavn Marathon.

## Marathon

Á Longsta teininum (Marathon) vóru tað 33 mans og 3 kvinnur, sum komu á mál. Her var tað Cecil Weihe (Bragdið), sum fór við sigrinum. Hetta var dagin eftir, at hann rann hálvt marathon á oyggjaleikunum í Hetlandi. Cecil rann teinin uppá 2 tímar 56 min og 15 sekund. Honum á baki komu Borgar Biskupstø (Treysti) og Sigurð B. Justinussen (Bragdið). Veteranarnir Pól Sundskarð (Treysti) og Jósvein H. Olsen (Bragdið) komu á fjórða og fimta plássi, og gjørdust teir tí nummar eitt og tvey í veteran bólkinum. Hjá kvinnunum vann Petra G. Neuman (Treysti) frammanfyri Britt H. Sørensen (Danmark) við Majbritt Vestergaard (Ísland) á triðja plássinum. Petra rann teinin uppá 3 tímar 37 min og 33 sekund.

## Hálvt-marathon

Eins og á marathon-teininum var tað ein oyggjaleika luttakari, sum vann í hálvum marathon. Tað var Guttorm Sørensen úr Treystinum. Hann rann teinin uppá 1 tíma 27 min og 58 sekund, ella umleið níggju minuttir seinni enn tá hann rann sama tein dagin fyri á Hetlandi. Nummar tvey gjørdist Trygvi Hansen (Bragdið) við veteraninum Óla Olsen (Bragdið) á triðja plássinum.

Hjá kvinnunum vann Sigrid Sivertsen (Treysti) framman fyri Ann Thomsen (Bragdið) við Gunvá Egholm á triðja plássinum. Tíðin, sum Sigrid, rann teinin uppá var 1 tíma 51 min og 10 sekund.



*Cecil Weihe var aftur fyrstur á mál í Tórshavn Marathon leygardagin, hóast hann dagin fyri hevði runnið hálvt marathon í Hetlandi*

## 5,6 km

Hendan teinin vann yngsti maður í kappingini. Tað var Jan Elmar Sørensen úr Treystinum, sum rann teinin uppá 23 min og 32 sekund. Hann var næstan tveir minnuttir skjótari á mál enn næsti maður, sum var Carl Eli N. Samuelsen , ið aftur var góðan hálvan minnutt frammanfyri Tummas Justinussen (Bragdið). Eins og hjá monnum vóru tað tey ungu sum vístu vegin í kappingini hjá kvinnunum. Her vann Bjørk H. Olsen (Bragdið) frammanfyri Joan Bláfoss við Rannvu Djurholm (Bragdið) á triðja plássinum.

## 3 km

Hesin teinur er bert fyri børn, sum eru fødd í 1993 ella seinni. Børnini, sum fyri stuttum hava verið í Svøríki og runnið, stóðu seg aftur væl. Hjá gentunum var tað Rebekka Fuglø (Treysti), ið vann við Silju Niclassen (Frælsi) beint í hølunum. Á triðja plássi var Kristín Lív Jónsdóttir (Ísland) og Bjørk R. Svabo (Frælsi) endaði á fjórða plássinum.

Hjá dreingjum var tað Rúni Seloy (Bragdið) ið vann framman fyri Árna Johannesen við Boga Berg (Bragdið) á triðja plássinum. Her er vert at leggja til merkis, at Árni er tvey ár yngri enn hinir báðir heiðursmerkja vinnarnir.

# FM í kasti leygardagin

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*

Leygardagin verður FM í kasti við Eysturskúlan í Havn. Tað er Bragdið, ið skipar fyri FM-kappingini í samstarvi við FÍF.

Á skránni eru diskus-, spjót- og hamarkast. Kappast verður á kastibreytini við Eysturskúlan, og byrjað verður klokkan 14 við hamarkasti, síðani verður kastað við diskus og at enda við spjóti.

Allir limir í feløgum undir FÍF (Bragdið, Roysnið, Treysti og Frælsi) eru vælkomnir at luttaka. Nýggir limir kunnu tekna seg á staðnum.

## formuladeildin

| | | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 17 | 11 | 2 | 4 | 49 | 20 | 29 | 35 |
| 2 | B36 | 17 | 10 | 5 | 2 | 25 | 8 | 17 | 35 |
| 3 | Skála | 17 | 9 | 6 | 2 | 35 | 18 | 17 | 33 |
| 4 | NSÍ | 17 | 7 | 6 | 4 | 27 | 22 | 5 | 27 |
| 5 | EB/Streymur | 17 | 5 | 8 | 4 | 18 | 24 | -6 | 23 |
| 6 | VB | 17 | 5 | 3 | 9 | 23 | 30 | -7 | 18 |
| 7 | GÍ | 17 | 5 | 3 | 9 | 22 | 29 | -7 | 18 |
| 8 | ÍF | 17 | 4 | 4 | 9 | 20 | 42 | -22 | 16 |
| 9 | KÍ | 17 | 4 | 2 | 11 | 23 | 34 | -11 | 14 |
| 10 | TB | 17 | 3 | 5 | 9 | 15 | 30 | -15 | 14 |

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Hans á Lag | HB | 10 |
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Allan Mørkøre | B36 | 8 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 8 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 8 |
| Bogi Gregersen | Skála | 8 |
| Dan Djurhuus | VB | 8 |
| Rúni Nolsøe | HB | 7 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 7 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 7 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 6 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 6 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 5 |
| Atli Danielsen | KÍ | 5 |
| Óli Johannesen | TB | 5 |
| Milan Kulic | VB | 5 |

Besti málskjúttin í fyrstu deild fær eftir kappingarárið handað gylta skógvin frá Adidas